# TILTØK

SAMBAND
SIGRID TRÓNDARSON
SIGRID@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

**Gudstænastur**
**23. sunnudag e. trinitatis**
***Vesturkirkjan:*** kl. 11 Hanus Simonsen
***Havnar kirkja:*** kl. 11, Sverri Steinhólm
***Nólsoy:*** kl. 12, Kristine Hestbech
***Hoyvíkar kirkja:*** kl. 11, Petur Martin Rasmussen
***Gásadalur:*** kl. 11 altargongd, David Johannesen
***Vestmanna:*** kl. 11, familjugudstænasta, Inga Poulsen Dam
***Kvívík:*** kl. 12, Marjun Bæk
***Tjørnuvík:*** kl. 12, altarg., Mogens Tilsted Christensen
***Skáli:*** kl. 11, altargongd, Jógvan Fríðriksson
***Selatrað:*** kl. 17, altargongd, Jógvan Fríðriksson
***Fríðrikskirkjan:*** kl. 11, altarg., Hans J. Joensen, biskupur
***Norðskála:*** kl. 12 messa (minningarhald) Emil Olsen
***Funningur:*** kl. 17 messa (minningarhald) Emil Olsen
***Christianskirkjan.*** kl. 11, Magnus Brahé Jørgensen
***Tvøroyri:*** kl. 11. Símun Jacobsen
***Hvalba:*** kl. 12.30, Símun Jacobsen - familjugudstænasta
***Vágur:*** kl. 11 Vágur + Dåb, Patrick de Neergaard
***Porkeri:*** kl.12, Bjarni Bæk
***Fámjin:*** kl. 11, Jónsvein Bech.
***Øravík:*** kl. 12.15 Jónsvein Bech. ***Í báðum støðum gongur talvan fyri Einkjugrunnin.***

**Frá Meinigheitshúsinum í Havn**
Týskvøldið kl. 20 Bíbliutími v. Jógvan Garðsá, evni: Jeramia profetur.
Hósdagin kl. 16-16.45 venur gentukórið - fyri gentur frá 2. flokki.
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti v. Sverra Steinhólm, evni: kærleiki og kynslív.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti »Tey vendu um« seks ymiskir vitnisburðir. Árni og Natasha syngja. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frá Kirkju- og missiónshúsinum á Argjum**
Hósdagur 8. november kl. 20 Bíbliutími við Hera Joensen, presti (2. Kor.11)
Fríggjadagur kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudagur kl. 11 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Marian Djurhuus Poulsen, Strendur.
Mánadagur kl. 19.30 Sjómanskvinnuringurin møtir á Hotel Tórshavn saman við sjómanskvinnuringinum í Meinigheitshúsinum í Havn. Øll hjartaliga vælkomin! Sí annars www.koma.fo

**Adventkirkjan**
Týskvøldið kl. 19.30, bønarmøti hjá Birgir og Agniescku Johannesen, Hoydalsvegur 34.

**Fríkirkjan Oasan Kirkjustræti**
Hóskvøldið kl. 20 ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 11 Guðstænasta v/Tóra Slættalíð Evni: Hví mátti Jesus doyggja, kl. 14 sunnudagsskúli, Sunnukvøldið kl. 18 Møti v/ luttøku av Olvheðin Jacobsen, Thomas J. Askham. Oasubrøðurnir syngja.
Mánadagin kl 17.15 venur barnakórið, kl. 20 bønamøti. Verið hjartaliga vælkomin. www.oasan.fo

**Evangeliihúsið, Tróndargøta.**
Mikudagin kl. 17.15 venur barnakórið.
Hósdagin kl. 16 eldrahugni.
Fríggjakvøldið kl. 21 ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 11 familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla, Tummas Jacobsen talar, kl 18 ungdómurin hevur møti.
http://www.gospel.fo

**Missiónshúsið v/ Landavegin**
Hóskvøldið kl. 20 Møti.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli á Norðasta Horni. Kl. 18 Møti v/ Jústines Poulsen.

**Frelsunarherurin Tórshavn**
Týsdag kl. 20 Hornvenjing.
Mikudag kl. 15,00 Bønarløta. Gevinstir til árasøluna verða móttiknir við tøkk kl. 19-20. Andakt á Vallalíð kl. 19.00.
Hósdag kl. 19 byrjar tann stóra ÁRASØLAN (Basarur), nógvir góðir vinningar, drekkamunnur í pausuni.
Fríggjadag kl. 19.30 Korpsráð.
Sunnudag kl. 11 Møti við Barnavælsignilsi.
Kl. 14 sunnudagsskúli.
Møti kl. 18.
suppa, sápa og frelsa síðan 1865.

**Ebenezer**
Týsdag kl. 18.55 Sangvenjing – Gospel Hearts,
kl. 20 Sangvenjing - Ebenezerkórið.
Mikudag kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti
Hósdag kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudag kl. 11 Minnismáltíð Harrans,
kl. 12.00 Sunnudagsskúli,
kl. 18.00 Evangeliskt møti.
Mánadag kl. 12.30 Andakt
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Samkoman Immanuel Brekkutún 3, Hoyvík**
Mikukvøld 7. nov. kl. 20 Bíbliutími.
www.immanuel.fo

**KFUM og KFUK í Havn**
Týsdagin kl. 17 í KFUK: Várgleði fyri børn.
Týsdagin kl. 19.30 í KFUM: Kristiliga sangkórið venur. Nýggir sangarar eru vælkomnir við.
Mikudagin kl. 19 í KFUM: Tensing-kórið venur.
Hósdagin 8. nov. í KFUK: Kvøldseta. Havi okkurt kreativt við.

**Møtirøð við Moses Hansen og Elizer Braun**
Týsdagin kl. 20.00 møti í Missiónshúsinum í Sørvági.
Mikudagin kl. 20.00 møti í Betania, Skopun.
Hósdagin kl. 20.00 møti í Hæddini í Runavík.
(Innsavna verður til at stuðla heimkomu jødanna).

**Tórshavnar hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Miðvágs missiónshús**
Sjómanskvinnuringurin kemur saman í Missiónshúsinum mikukvøldið kl. 19.30. Mint verður á jólapakkarnar.
Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

**Filadelfia, Miðvágur**
Mikukvøldið kl. 20 bønarmøti.
Hóskvøldið kl. 20 ungdómsmøti.
Fríggjakvøldið kl. 19.30 byrjar vikuskiftið við ókeypis skeiði við Andreas Jørgensen.
Leygardagin kl. 10 - 15 ókeypis skeið við mati, kl. 20 møti.
Sunnudagin kl. 11 familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla, kl. 18 møti, Andreas Jørgensen talar á báðum møtunum.

**90 ár**
Mikudagin 7. november verður Kristian Johannesen, vanliga nevndur Kristian í Miðstovuni, á Sandi 90 ár. Dagurin verður hildin í Missiónshúsinum frá kl. 15-19.

**70 ár**
Leygardagin 17. nov. verður Óli Abrahamsen, Fuglafjørður, 70 ár. Dagurin verður hildin í Kelduni í Skálafirði kl. 13.00. Tey, ið vilja gleða hann, við at koma í føðingardag, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 444316 áðrenn 12. november.





Eg fari á Fólkating fyri at samstarva, fyri at gera nyttu av ríkisfelagsskapinum, og harvið tala søk føroyinga.

Eg fari at styrkja føroyska búskapin við at geva føroyskum kreativiteti eina altjóða rás gjøgnum Danmark; fáa føroysk virkir við í stóra virksemið hjá dønum í altjóða høpi.

Eg fari at brúka tað størsta óbrúkta tilfeingið, vit eiga, nevniliga føroyingar um allan heim. Hópurin við dugnaligum og høgt spesialiseraðum føroyingum býr ikki bara í hinum Norðanlondunum, men eisini úti í Evropu, Ameriku, Avstraliu og Asiu.

Eg fari at skapa eina altjóða "Føroya-rørslu" við tilsamans 80-90.000 føroyingum. Basan verður í Føroyum.

Eg fari at gera eitt ítøkiligt uppskot til, hvussu Føroyar fáa gleði av hesum ótroytta tilfeingi.

Flestu okkara búgva í longri ella styttri tíðarskeið í Danmark.

Eg fari via mítt fólkatingsarbeiði at vera advokatur hjá teimum, og arbeiða fyri, at tey fáa sámiliga viðgerð í Danmark.

Eg fari at gera lógir, sum lætta um hjá føroyingum í Danmark, so tað verður trygt og gott at flyta niður.

Eg fari at arbeiða fyri smidligari og bíligari sambandi millum Føroyar og Danmark. Tað skal verða bíligari at ringja og at senda brøv millum londini.

Tollurin skal lækkast og tað skal eisini verða bíligari at ferðast millum Danmark og Føroyar.

B